# Tveir snøggir skrokkar úr Pólandi

**Tórshavnar Skipasmiðja eigur sáttmálarnar um trolbátarnar, sum tíðliga komandi summar koma í flotan fyri Hansu Mariu av Toftum og Dúgvuberg, sum eitt felag í Vestmanna nú eigur**

NÝBYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri komu tveir nýbygdir skrokkar á Havnina. Skrokkarnir eru komnir úr pólska býnum, Gdansk, har teir eru bygdir.

Ein danskur sleipibátur sleipaði báðar skrokkarnar til landið. Undir sleipinum longu leiðina heim úr Pólandi hekk annar skrokkurin einar 300 metrar afturút og hin aðrar 300 metrar afturúr tí fyrra.



*Teir eru líkir teimum stóru skipunum í útsjónd og eru snøggir á at líta*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Sáttmálin føroyskur

Tað er Tórshavnar Skipasmiðja, sum eigur sáttmálan við reiðaríini, ið hava latið bátarnar byggja. Teir eru projekteraðir og teknaðir á skipasmiðjuni, og nú skrokkarnir eru komnir til landið, verða bátarnir gjørdir lidnir í stóru byggihøllini, sum skipasmiðjan hevur.

Annar báturin kemur í flotan fyri trolbátin, Hansu Mariu á Toftum og hin fyri Dúgvuberg, sum vestmenningar nú eiga.

Sambært sáttmálanum verða teir lidnir og klárir at fara til fiskiskap flaggdagin komandi, 25. apríl.

Samlaði byggikostnaðurin verður einar 9-10 miljónir krónur fyri hvønn bátin – alt eftir, hvussu teir verða útgjørdir, og um útgerð møguliga kemur úr gomlu bátunum, sum feløgini eiga.

Hansa Maria og Dúgvuberg hava loyvi at royna á landleiðini um sumrarnar, og nýggju bátarnir eru eisini bygdir sambært teimum treytum, sum her eru galdandi.

### Snøggir bátar

Skrokkarnir, sum í dag liggja við bryggjuna undir Tórshavnar Skipasmiðju, eru snøggir á at líta. Teir líkjast teimum stóru skipunum í útsjónd og eru vakrari enn bátarnir, sum eitt nú leirvíkingar hava latið byggja í Íslandi.

Manningarumstøðurnar umborð verða góðar. Har frammi í skipinum verða tvey tvey-manskømur og beint aftanfyri í bakborði verður skiparakamarið. Messan verður yvirav skiparakamarinum og beint aftanfyri manningarkømrini.

Trolposin verður eins og á teimum størru skipunum tikin inn afturi á hekkuni, og síðan fer fiskurin niður í pavnar. Haðani eru lúkur at lata upp, soleiðis at fiskurin kemur inn á arbeiðsdekkið, sum partvís er klatt við rustfríum stáli.

Enn er ikki endaliga avgjørt, hvussu arbeiðsdekkið, sum eisini er innilokað, verður innrættað.

Lastin er eisini klødd við rustfríum stáli.

Sosialurin var umborð á bátunum fríggjadagin, har ein maður hjá Tórshavnar Skipasmiðju vísti okkum runt.

# Tað er deiligt at byggja aftur

**– Tað eru eini trý ár, síðan vit seinast bygdu ein nýbygning, og tí er tað deiligt at sleppa at byggja skip aftur – ikki minst, nú minni hevur verið at gjørt í seinastuni, siga tey á Tórshavnar Skipasmiðju**

NÝBYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Skrokkarnir, ið Tórshavnar Skipasmiðja vegna feløgini, sum eiga Hansu Mariu og Dúgvuberg, hevur latið byggja í Pólandi, verða nú gjørdir lidnir á skipasmiðjuni.

– Alt stál- og aluminiumsarbeiði er gjørt í Pólandi, men nú er so restin eftir sum skal gerast, meðan bátarnir standa á Tórshavnar Skipasmiðju.

Á skipasmiðjuni siga tey, at tann parturin, sum eftir er, fevnir um ísetan av høvuðsmotori, spølum, apeteringsarbeiði, rør, el og annað, sum hoyrir einum skipi til.

– Í peningi er hetta nógv tann størri parturin av teimum umleið 9-10 miljónunum, sum hvør bátur kostar at byggja.

Sum nevnt í greinini omanfyri, hevur Tórshavnar Skipasmiðja projekterað og teknað bátarnar, og tað er tískil skipasmiðjan, sum hevur latið skrokkarnar byggja í Pólandi.

### Stóran týdning

Í slíkum arbeiði hevur skipasmiðjan nakrar undirleverandørar og tann størsti, sum nú kemur inn í myndina, eru teir, sum skulu gera apeteringsarbeiði.

Á skipasmiðjuni fegnast tey um aftur at sleppa at byggja nýggj skip.

Tað eru eini trý ár, síðan skipasmiðjan bygdi seinasta nýbygningin, sum var alibáturin, Ruth, ið fór til Klaksvíkar.

– Tað er deiligt aftur at sleppa at byggja nýbygningar, hóast hetta eisini eru lutfalsliga smáir bátar, siga tey á skipasmiðjuni.

Á Tórshavnar Skipasmiðju vænta tey, at einir 10 mans meira at kalla burtur av verða knýttir at nýbygningunum fram til endan av april mánaði, tá ið báðir bátarnir skulu verða lidnir.

– Tað verður ikki soleiðis, at allir, sum arbeiða hjá okkum, verða knýttir at hesum arbeiði, men hetta ger góðan mun, nú minni hevur verið at gjørt í seinastuni, verður sagt á Tórshavnar Skipasmiðju.



*- Tað verður ikki soleiðis, at allir, sum arbeiða hjá okkum, verða knýttir at nýbygningunum, men hetta ger góðan mun, nú minni hevur verið at gjørt í seinastuni, verður sagt á Tórshavnar Skipasmiðju. Á myndini síggja vit Vesturbúgvan, sum nú fær nýggjan høvuðsmotor eftir, at gamli motorurin fór í knús*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*





Politikkur á Margarinfabrikkini:

# Her sleppa tey ungu framat

**– Alt ov lítið verður gjørt fyri at skapa ein politiskan áhuga ímillum ungdómin. Tey flestu ungu halda politikararnar vera gamlar og keðiligar, og vit ætla at vísa teimum nakað annað við einum ungmannafelagsfundi, sigur Guðrun Hansen, pedagogur á Margarinfabrikkini**

VALIÐ
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Hósdagin 21. oktober verður ein politiskur ungmannafundur hildin á Margarinfabrikkini. Guðrun Hansen, fyriskipari, sigur, at hetta verður ein fundur við ungum og fyri ung, fyri at kveikja politiska áhugan ímillum ungdómin í Havnini.

### Kjak

– Vit ætla at hava trý evni, sum hesi ymisku ungmannafeløgini skulu tosa um. Tað fyrsta er eitt ungdómshús í Havnini, við einum spælistaði til okkara tónleikarar. Næsta evnið verður búðstaðir til ung, og seinasta evnið, kjakað verður um, er galdandi aldur til valrætt, greiðir Guðrun frá.

Hon sigur, at ætlanini ikki er at hava ein fund, har áhoyrararnir, bara skulu lurta, men heldur, at øll skulu fáa góðan møguleika at vera við í kjakinum. Hon leggur dent á, at nógv tíð er sett av til kjak, heldur enn til valevnini at tosa í.

– Vit fara at hava eitt umboð fyri hvørt ungmannafelag, sum ger eina stutta framløgu um, hvat teirra flokkur heldur um ymisku evnini, og so verður góð tíð at kjakast í, sigur hon og leggur afturat, at Óluva Zachariassen úr útvarpinum kenur at halda skil á kjakinum.

Í steðginum spæla Terji Rasmussen og Magnus Johannesen, sum báðir eru kendir tónleikarar í Føroyum, og sum kanska fara at gera sítt til at draga fólk.

Guðrun leggur dent á, at tey eldru valevnini skulu vera so hjartaliga vælkomin, men at tey ikki skulu vera dominerandi á fundinum.

– Vit vilja ógvuliga fegin bjóða teimum gomlu, garvaðu politikarunum at hoyra, hvat ið rørir seg ímillum ungdómin í Havn. Tey kunnu koma at lurta, hvat tey ungu siga, og so kanska gera onkra viðmerking, sigur hon. – Men tey skulu ikki leggja hald á fundin, staðfestir Guðrun.

Fundurin byrjar kl 19.00, og eingin tíðarfreist er ásett, nær fundurin skal enda.

– Vit ætla at halda á so leingi sum fólk hava hug at kjakast, sigur Guðrun.

### Ov lítið av ungdómspolitikki

Grundin til, at tey á Margarinfabrikkini eru farin undir hetta tiltakið, er tí, at tey meta alt ov lítið vera gjørt fyri tey ungu í sambandi við politikk.

-– Tað er uppá tíðina, at vit draga tey ungu við í politiska kjakið. Tey eru ein partur av demokratinum, men tey verða alt ov ofta yvirhoyrd. Tað líkist ongum, sigur Guðrun

– Tey verða als ikki tikin við í samfelagskjakið, men vit seta teimum hóast alt stór krøv. Við hesum vilja vit geva teimum ein smakk av demokratinum, sigur hon.

Guðrun leggur dent á, at tey ungu heldur ikki koma í samband við nakran politikk fyrr enn í miðnámsskúlunum. Tey, ið ikki hava valrætt, hava tí sum oftast onga meining um politikk og flokkar. Og hava heldur onga grund at hava tað.

– Tað er sera spell, tí tey eru veruliga áhugað, og tey halda tað vera spennandi, um tað bert verður lagt fram á ein positivan og lættan hátt. Tey halda ofta, at politikararnir eru gamlir og keðiligir, og við hesum fara vit at royna at skapa eina aðra mynd av politikki, við at vísa teimum á ungdómspolitikararnar, greiðir Guðrun frá.

Hon sigur, at tey veruliga ynskja, at tað koma so nógv ymisk ung, bæði við og uttan valrætt, sum gjørligt, fyri at so nógvar meiningar sum møguligt kunnu koma fram.

– Teimum, ið júst hava fingið valrætt, vilja vit vísa eina aðra síðu av politiska lívinum. Vit vilja vísa teimum á nakrar politiskar møguleikar, við at seta tey í samband við hesi ungu fólkini, sum longu eru í politikki. Og teimum, sum ikki hava fingið vælrætt enn, vilja vit vísa, at nakað eitur politiskir fundir, og tað nýtist ikki bert at vera við gomlum og keðiligum politikarum, sigur Guðrun. Pallborðsfundurin við ungmannafeløgunum er eitt úrslit av einum samstarvið ímillum Margarinfabrikkina, Føroya Ungdómsráð og Polung, sum er nýggja samskipanin fyri politisku ungmannafeløgini. Tey eru øll samd um stóra tørvin, sum er á politiskum fundum fyri ung.

– Hølini í Margarinfabrikkini eru sera væl egnað til tílík tiltøk, so eg vóni veruliga, at tað koma nógv ung at lýða á og kjakast, sigur Guðrun at enda.

Fundurin verður, sum áður nevnt, hóskvøldið 21. oktober kl 19.00.

# Nýggi leikarin á politiska pallinum

**Politisku ungmannafeløgini hava nú sligið seg saman. Ùrslitið er samtakið Polung, sum hevur til endamáls at skipa fyri politiskum tiltøkum fyri ung og birta kjak**

UNGDÓMS-POLITIKKUR
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

– Vit hava stovnað eitt samtak, har øll tey politisku ungmannafeløgini eru limir, sigur Turid Chrisophersen, formaður í Polung.

– Vit hava sera góðar royndir av at skipa fyri tiltøkum saman, millum annað høvdu við taburáðstevnuna á sinni, og tí hildu vit nú, at vit tað sama kundu skipa okkum í eitt felag, greiðir hon frá.

### Nógvir felagsnevnarar

Turid sigur, at polung bert kemur at skipa fyri tiltøkum, sum øll ungmannafeløgini kunnu semjast um.

– Hóast vit eru í hvør sínum flokki, so hava vit tó nógvar felagsnevnarar. Til dømis vilja vit øll fegin hava eitt politiskt kjak í lag ímillum ungdómin. Tað er ikki torført at finna evni, sum vit øll ynskja at kjakast um, sigur hon.

Turid sigur, at samtakið Polung ikki er nakað, sum ungmannafeløgini hava tosað um í serliga langa tíð. Hinvegin er tað heldur ikki ein spildurnýggj hugsan hjá teimum flestu.

– Tað vísir seg at vera sera lætt hjá okkum at skipa fyri tiltøkum saman, tí vit ynskja jú øll meiri ella minni tað sama. Samtakið Polung fer bert at gera tað lættari at fáa politisk tiltøk fyri ung upp á beinini, sigur Turid. Hon sigur, at tað higartil hevur verið rættiliga strævið at fáa hesi ymisku tiltøkini í lag.

– Tað verður so ógvuliga nógv arbeiði, tá ungmannafeløgini hvør sær skulu skipa fyri tiltøkum. Fyrst skulu tey finna okkurt aktuelt evni at kjakast um. Síðani skulu tey finna okkurt annað ungmannafelag at kjakast við. Men hini ungmannafeløgini hava so kanska hug at kjakast um onnur evni o.s.fr. Nú fundast vit um tiltøkini og evnini, og so arbeiða vit øll saman, greiðir Turid frá, og leggur dent á, at tey bert fara undir tiltøk, sum full semja er um.

Turid vónar, at ungdómurin kemur at merkja nýggja samtakið á tann hátt, at tað framyvir koma at vera fleiri politisk tiltøk fyri ung á skránni.

### Áhugin er har

Turid heldur avgjørt, at tað er neyðugt at hava politiskar fundir, eisini fyri tey, ið enn ikki hava valrætt.

– Ert tú 17 ár, er tað bert eitt ár til tú hevur valrætt. Tað kann eisini vera ein mánaður ella ein vika. Tí er tað týdningarmikið at vita hvat gongur fyri seg. Tey kunnu eisini vera 15-16 ára gomul, tí jú fyrr tú byrjar at tosa um politikk við tey ungu, jú betur eru tey fyri, tá krossurin so einaferð skal setast, staðfestir Turid.

Hon heldur avgjørt, at tey ungu hava stóran áhuga fyri politikki. Tað er bara ikki altíð, at tey vita, at tað er politikkur.

– Inni á Pop.fo var herfyri eitt stórt og drúgt kjak, um eitt spælistað til tónleikararnar í Havn. Tey ungu høvdu nógvar og sterkar meiningar um tað, og tað er jú politikkur. Men tá tey 15 ára gomlu síggja ein politikara standa í tinginum og tosa um fiskivinnupolitikk, so skilji eg væl, at tey halda, at hatta ikki rakar tey, heldur Turid.

Hon sigur, at áhugin fyri politikki tí avgjørt er til staðar, men at tað avhongur av, hvussu tað verður lagt út.

– Um tey síggja, at tey eru ein partur av politiska kjakinum, t.d. um tað snýr seg um eitt spælistað til teirra ella skúlaviðurskiftini, so eru tey við og hava eina meining, staðfestir Turid.

Tað er júst hetta, sum er ætlanin við Polung. At fáa í lag politiskt kjak um evni, ið tey ungu hava áhuga fyri. Og at geva teimum ungu ein møguleika at koma við í kjakið og verða hoyrd.

Næsta tiltakið, ið stendur á skránni hjá Polung, verður í Margarinfabrikkini hóskvøldið 21. oktober kl 19. Tá verður politiskt kjak fyri ungdómin.